# Mítt NEW YORK

SKRIVAÐ HEVUR RANNVÁ GUÐRUNARDÓTTIR NICLASEN



Rannvá Guðrunardóttir Niclasen hevur búð í New York í fimm ár. Her eru hennara viðmæli, um tú ætlar at gera tær ein túr beinleiðis til New York við Atlantic Airways

MATUR

## FOOD TRUCKS

Fert tú á eina vanliga matstovu í NY, kann ein einføld salat skjótt kosta 100 krónur – og tá eru avgjøld og drykkjupeningur ikki íroknað. Eg vil nógv heldur viðmæla ein av mongu vognunum í NY, sum selja indiskar, grikskar og/ella meksikanskar rættir fyri uml. 40 krónur. Í New York búgva fólk úr allari verðini, og tað sæst týðiliga á teirra fantastisku og fjølbroyttu matmentan, og einki er líka autentiskt sum matur frá einum New York Food Truck. Tað er ikki ‚fine dining', men tað smakkar líka væl, og tú kanst seta teg í eina park nærhendis at njóta matin og umhvørvið. Tað gerst næstan ikki meira New York enn tað sama. Hvørja ferð eg komi til New York eftir at hava verið



burturstødd, gleði eg meg til at keypa ‚chicken over rice' fyri 40 krónur íroknað drykkjuvøru og njóta matin í Union Square Park.

## KOREAN BBQ

Ætlar tú tær á matstovu og eina serstaka matuppliving, so vil eg viðmæla tær at fara til Korea Town og royna Korean BBQ. Bílegg fyrst drykkjuvørur og síðurættir og síðani alskyns rátt kjøt – svínakjøt, høsnarunga, oksakjøt – og fylg við, meðan tænarin hitar pannuna, sum er mitt á tínum borði, og matger til allar gestirnar við borðið. Ein av mínum yndisupplivingum, tá ið eg havi verið úti og etið.



## MILON

Mín yndismatstova, og hetta hevur verið mítt serliga New York stað at fara við vinum og familju, tá ið tey koma at vitja. Milon. Ein lítil, indisk BYOB matstova (Bring your own beer/booze) við alt ov nógvum – og tó júst passaliga nógvum – kertuljósum, fløggum, perum, pynti, konfetti og speglum allastaðni. Har er lítið og onki skil á, men tað er perfekt! Har eru tríggjar næstan líka matstovur við síðuna av og undir Milon, men tað ger ikki mun, hvar tú fert. Upplivingin er tann sama, og trúgv mær, tú sært matstovurnar langan veg takkað veri øllum blinkandi ljósperunum.
*milonindianrestaurant.com*
*93 1st Avenue, New York, NY 10003*

Tú kanst sjálvandi ikki vitja New York uttan at royna eina New York Pizza Slice ella ein Cream Cheese Bagel – serliga ein Everything Bagel. Just sayin'.

Minst til, at á matstovum, barrum, í hýruvognum og líkn. er vanligt at geva drykkjupening. Vanliga er tað umleið 18–20% av rokningini. Keypir tú tær ein kopp av kaffi út við, gevur tú ikki drykkjupening á sama hátt, men tú fert ongantíð skeiv/ur av at geva 1 $ eyka.



UTTANDURÐA

New York hevur óteljandi parkir. Stórar og smáar. Um tú vilt lurta eftir jazzi, síggja live framførslur, sita á einum bonki og lesa í friði og náðum ella liggja í grasinum og njóta sólina, so finst ein park fyri teg, líkamikið hvar í New York tú ert.

## WASHINGTON SQUARE PARK, NEW YORK, NY 10012

Er í Greenwich Village økinum og er best kend fyri The Washington Square Arch, ið varð bygdur í 1892, og stóra gosvatnið í miðjuni. Parkin hevur fleiri smærri grøn øki, har tú kanst sóla tær. Benkur, har tú kanst lurta eftir jazzi, klassiskum tónleiki, ella hvat tað skal vera, fyri smápening. >



### BRYANT PARK, NEW YORK, NY 10018

Umframt almennar uttandura filmsýningar og dansitímar, so skipar Bryant Park eisini fyri ókeypis tónleika-, sjónleika- og dansisýningum um summarið. Tað er 100% vert at pakka eitt teppi og ein bita og gera sína egnu útferð til eina av teimum fjølbroyttu sýningunum mitt í New York – umgird av háhúsum.

### BATTERY PARK, NEW YORK, NY 10004

Hendan parkin er meira ein havn enn ein park. Tú kanst spáka eftir gøtunum fram við East River til Hudson River við frálíkum útsýni yvir Brooklyn og New Jersey, serliga um kvøldið, tá ið tað er myrkt, og ljósini úr bygningunum lýsa bjart. Tú sært Frælsisgudinnuna í sjónarringinum, og um tú hevur hug, kanst tú leypa umborð á ókeypis ferjuna til Staten Island, ið siglir hvønn hálvan tíma. Staten Island Ferry siglir fram við Frælsisgudinnuni, og tú sært ein ógloymandi Manhattan sjónarring.

### CENTRAL PARK

Belvedere Castle, minnisvarðar (Strawberry Fields, Balto, Alice in Wonderland v.m.), baseball, vøllir, karrusellir, árabátar, Shakespeare, uttandura filmsýningar. Central Park hevur nógv at bjóða sínum vitjandi. Sjálv haldi eg, at tað er best bara at hava ein dag, har tú hevur góða tíð at spáka og njóta umhvørvið uttan stress. Taka eitt teppi við og mat til eina lítla útferð, leiga ein av bátunum og rógva í tjørnini og taka ein steðg frá ‚the New York Hustle‘.

### PROSPECT PARK

Ert tú í Brooklyn og hevur hug at brúka ein heilan dag í eini park uttan eina rúgvu av ferðafólki og sleppa undan háhúsum og billarmi? So er Prospect Park júst nakað fyri teg. Á veg út úr Parkini kanst tú fara á Brooklyn Public Library.

### TIMES SQUARE

Spyrt tú ein lokalan New York'ara, so gera teir alt, teir kunnu, fyri at sleppa undan Times Square. Hví? Tí Times Square er fyri teir bert ein ørgrynna av ferðafólkum og Mickey Mouse, Buzz Lightyear og Pikachu skapilsum, sum lokka teg at taka myndir við sær, sum tú síðani skalt gjalda fyri. Blinkandi ljós, óljóð, hurlivasi og souvenirhandlar. Men hví skalt tú so hagar? Times Square er hjartað á Manhattan!



### FLATIRON BUILDING

Eitt av teimum elstu og mest eyðkendu háhúsunum á Manhattan. Bygt í 1902 og skuldi upprunaliga eita ‚The Fuller Building‘, men varð ístaðin kallað ‚Flatiron‘, tí tey lokalu hildu, at bygningurin líktist einum strúkijarni. Spáka ein túr í góðveðri, keyp ein burgara og milkshake frá Shake Shack við uttandura sitiplássum í Madison Square Park og njót útsýnið.
*175 5th Av, New York, NY 10010*



### ROOSEVELT ISLAND TRAMWAY

Tú átti at fingið tær eitt óavmarkað metrokort, meðan tú ferðast í New York. Tað gevur millum annað møguleikan at fara upp í lyftuna til Roosevelt Island, ið er beint við Queensborough Bridge, og ferðast oman fyri East River við framúrskarandi útsýni til m.a. á Empire State Building og Chrysler Building.

### LITTLE ITALY/CHINATOWN

Hesi bæði eru á einum lítlum øki ‚downtown‘ í Manhattan. Chinatown er ein ruðuleiki av blunkandi kinesiskum skeltum, íbúðum, handlum, ið selja fisk og kinesiskar matvørur uttanfyri, souvenir-handlum og smáum matstovum. Little Italy er ein long gøta á tremur við hugnaligum og autentiskum italskum matstovum og dessert-kaféum. Ein handil, ið tú mást vitja, tá ið tú ert í Little Italy, er ‚Christmas in New York‘. Líkamikið um tú ert har í juli ella desember, so er hesin handilin altíð opin og selur altíð jólaprýði til ein og hvønn tørv og smakk. Vart tú ikki í jólahýri, áðrenn tú fórt inn, so ert tú tað heilt vist, tá ið tú fert avstað aftur.





SHOPPING

Vilt tú uppliva gøtuna við teimum dýrastu handlunum og merkivørum sum Louis Vuitton, Burberry, Fendi, Chanel osfr., so skalt tú spáka eftir 5th Avenue og/ella Madison Avenue frá Central Park. Fleiri handlar, sum hava rímiligari prísir, eru í økinum rundanum. Fert tú longur ‚downtown' til Soho, er tað eitt meira ungdómligt øki.
Um tú ætlar tær ein handilstúr í eitt sindur róligari og friðarligari umhvørvi, kann eg viðmæla at fara downtown Brooklyn og í Fulton Mall. Tað er ikki ein sølumiðstøð við handlum inni, men ein høvuðsgøta við alskyns handlum, stórum sum smáum, fleiri hugnaligar matstovur og kaffihús við minni rokan og hóvastáki.

MUST SEE

### GRAND CENTRAL TERMINAL

Eitt satt New York eyðkenni. Næstan allir filmar, ið ganga fyri seg í New York, hava eitt brot, har tey eru í Grand Central Terminal, sum er kent fyri framúr byggilist. Harumframt finnur tú eisini The Main Concourse við kendu klokkuni og the Dining Concourse við matstovum, kaféum og handlum.

### THE HIGH LINE

Eitt av mínum yndisstøðum at fara við gestum. The High Line er ein næstan 2,5 km long gongugøta, ið er løgd oman á eina gamla jarnbreyt nakrar metrar oman fyri Chelsea-økið á Manhattan. Hon er gjørd til eina linjurætta park – ein róligur og hugnaligur gongutúrur mitt á Manhattan, beint oman fyri annars fjølgongdu vegirnar og gøturnar í New York.

### ONE WORLD TRADE CENTER, 9/11 MEMORIAL OG THE OCULUS

Lið um lið downtown Manhattan kanst tú vitja the One World Trade Center og minnisvarðarnar The Oculus og The 9/11 Memorial. Tað seinasta er tvey djúp, fýrkantað hol, har tey upprunaligu háhúsini stóðu. Her eru nú tveir fossar umgirdir av nøvnunum á øllum teimum, ið mistu lívið í sambandi við 9/11. The Oculus er ein annar minnisvarði, ið eisini virkar sum jarnbreyta- og sølumiðstøð.




LIST

### MUSEUM OF MODERN ART – MOMA

Her finnur tú list hjá samtíðarlistafólkum umframt verk eftir Andy Warhol, Fridu Kahlo, Van Gogh, Picasso, Monet Dalí og onnur. Nakað fyri teg? Atgongumerkini kosta millum 90 og 170 krónur, og hvønn fríggjadag er ókeypis atgongd, men bíðiraðin kann gerast long. *moma.org*



### GUGGENHEIM

Eitt samtíðarlistasavn, hvørs sereyðkenni er bygningurin sjálvur. Savnið er bygt í 1939, og tað breyt fleiri aldargamlar reglur viðvíkjandi byggilist. Uttan iva eitt savn, ið er vert at vitja, ikki bert fyri listaverkini, men tá ið tú stendur inni í runda, spirala bygninginum, er tað ein uppliving í sær sjálvum. *guggenheim.org*



### THE MET

Hevur tú heldur áhuga fyri fornminnissøvnum og fornum listaverkum, so er the Met, sum hevur listaverk og lutir, ið eru upp til 5000 ára gamlir, nakað fyri teg. The Met hýsir bæði fornsøguligum og nýmótans framsýningum, og sostatt er okkurt til ein og hvønn áhuga. The Met er eisini eitt av teimum meira barnavinarligu listasøvnunum við m.a. dinosaurum og krígsmonnum frá stein- og jarnøldini o.ø. Harumframt skipar savnið javnan fyri barnatiltøkum. Kunna teg á heimasíðuni *metmuseum.org* >

Í Chelsea á Manhattan eru annars fleiri smærri, sjálvstøðugir listaskálar, ið ber til at vitja alt árið, og ofta er tað ókeypis.



## THE BUSHWICK COLLECTIVE

Í Bushwick, Brooklyn, ber til at síggja ótrúligt, undranarvert, stuttligt og litfagurt grafitti á bygningum og múrum í hópatali – ein ókeypis listasýning! Tak L-tokið til Morgan Ave og spáka í hesum kula up-and-coming grannalagnum í Brooklyn og far ein túr í mongu endurnýtsluklædnahandlarnar aftaná. Mín yndisendurnýtsluhandil er heilt víst Urban Jungle. Stórt úrval, og eg kann brúka fleiri tímar har. *thebushwickcollective.com*

## BAM

Um tú vilt síggja samtíðardans, konsertir, sjónleik ella film, so er BAM eitt gott boð. Har havi eg sæð verk eftir Pina Bausch, Batsheva og fleiri onnur umframt sýningar av framførslulist við íblástri frá listaverkum hjá Salvador Dalí. Tú sært meira kunning um sýningarnar á *bam.org*

NEW YORK VIÐ BØRNUM

Eg var eisini barnagenta, tá eg búði í New York og havi tí eisini upplivað býin í barnahædd. Hetta eru yndisstøðini hjá børnunum eg var barnagenta hjá í New York.

## BROOKLYN PIERS

Eg ELSKI Brooklyn Piers. Leiðin eftir gongubreytunum – ein við sjógvin, og ein ið er uppfrá – er góðar 2 kilometrar, um tú gongur frá Brooklyn Heights til Dumbo. Á leiðini ber til at vitja parkir, matstovur (eisini umborð á skipum), keypa ísar ella lemonadu (very American!), og tað ber enntá til at hava eina lítla grill niðri við sjógvin. Har eru fleiri spælipláss til børn, ein fótbólts- og kurvabóltsvøllur og ein uttandurasvimjihylur.

Við endan av Brooklyn Piers kemur tú til Brooklyn Bridge og Manhattan Bridge, ið báðar ganga til Manhattan. Millum brúgvarnar er ein næstan 100 ára gomul karussell, Jane's Carousel, sum tað bara kostar 13 kr. at royna.



## KAJAKK RÓGVING

Um summarið kanst tú fara til Hudson River Park Pier 96 í West Side av Manhattan, rinda tað, tær lystir, og fara í eina kajakk í Hudson River og rógva í hálvan tíma. Stuttligt við størri børnum.



## TRANSITMUSEUM

Í Brooklyn er eisini eitt savn, sum sýnir fram gamlar sporvognar og sigur søguna um undirgrundina í New York. Ein áhugaverd uppliving fyri bæði børn, ung og vaksin. *nytransitmuseum.org*



## CONEY ISLAND

Coney Island er eitt søguligt stað í Suður-Brooklyn, bæði við strond, matstovum og stuttleikagarðinum Luna Park. Um tú hevur hug at svimja í sjónum, sóla tær á strondini ella royna alt, sum Luna Park hevur at bjóða, so fært tú uttan iva brúkt ein heilan dag her. *lunaparknyc.com*

NÁTTARLÍV

## HOUSE OF YES

Hug at fara út at dansa? Dámar tær elektroniskan og house-tónleik? House of Yes í Brooklyn hevur reguliga ókeypis atgongd til temaveitslur, so sum 80-ara og 90-áraveitslur, rapp, rokk og drag-nights fyri at nevna nøkur fá dømi. Fylg við á teirra Facebook síðu.





## DRAG BRUNCH / BABYTEA BRUNCH

Ert tú við upp á at eta morgunmat/miðmála og drekka Bloody Mary's ella Mimosa afturvið, meðan Drag Queens undirhalda? Hvør í allari víðu verð sigur nei til tað? Ein av mínum yndis drag brunches er ‚Baby Tea Brunch' í Brooklyn við Charlene Incarnate og Tyler Ashley. Rátt, stuttligt, Disney Broadway, grovt, fjasut, vakurt, býttisligt ... Framúr gott!



## LE BAIN / 230 FIFTH ROOFTOP BAR

Tað er ókeypis atgongd til hesar báðar náttklubbarnar við atgongd til takterrassur. Le Bain er til tín, um tú vilt dansa alla náttina – ella kanska leypa út í innandura svimjihylin á 18. hædd aftur við elektroniskum tónleiki. 230 Fifth Rooftop er til tín, sum vilt sita á toppinum á einum 20 hæddir høgum bygningi við einum teppi, meðan prátandi ungdómur og nýmótans tónleikur doyvir alt annað ljóð. *Le Bain: 444 W.13TH STREET, NY 10014 – lebainnewyork.com*
*230 Fifth: 230 Fifth Ave (Corner 27th), Manhattan, NY 10001 – 230-fifth.com*



## FEINSTEIN'S/54 BELOW

Hendan speak-easy barr/matstovan undir Studio 54 bjóðar kabarettsýningar við kendum Broadway-stjørnum og up-and-coming talentum, meðan tú etur ein góðan døgurða og drekkur fínar kokkteylar. *254 W 54th St. Cellar, NYC 10019 – 54below.com*

## STONEWALL INN

Søgulig LGBTQ+ barr í Greenwich Village og staðið, har víðagitni uppreisturin í 1969 elvdi til byrjanina av stríðnum fyri rættindunum hjá samkyndum. *53 Christopher Street, New York – thestonewallinnnyc.com* ■

*„I look out the window and I see the lights and the skyline and the people on the street rushing around looking for action, love, and the world's greatest chocolate chip cookie, and my heart does a little dance."*

Nora Ephron, filmsrithøvundur